Týsdagin 8. September vórðu úrslitini frá PISA 2025 kunngjørd. Hetta er ein frágreiðing, sum gevur okkum nakað at fegnast um, nógv at hugsa um og ikki minst eisini nógv at arbeiða víðari við.

PISA er nógv meira enn ein samanbering millum lond. PISA gevur okkum eina mynd av, hvussu væl okkara ungu eru fyrireikað til at luttaka í samfelagnum, taka støðu til týdningarmiklar spurningar og skapa sína egnu framtíð. PISA er tí eisini ein "hitamátari" fyri, um vit megna at vera við í norðurlendska vitanarsamfelagnum.

PISA byggir á førleikarnar fyri 21. øld.Vilja vit vera við í vitanarsamfelagnum saman við hinum Norðurlondunum, mugu vit fyrihalda okkum til hesar førleikar og royna at fylgja við í, hvussu hetta verður gjørt, bæði hjá okkum sjálvum og ikki minst aðrastaðir.

Vit kunnu eisini koma til hina niðurstøðuna, at vit vilja ikki vera eitt vitanarsamfelag og ikki fylgja við nútíðar førleikum, sum grannalondini hava sett sær sum mál.

Politiska skipanin hevur hetta valið. Verður skúlaskipanin ikki raðfest, eins og nútíðar førleikar ikki verða raðfestir, verða vit heilt einfalt ikki eitt samfelag á støði við onnur Norðurlond. Valið er politiskt! Við onki at gera og bert tosa PISA-kanningina niður koma vit ikki longur fram á leið.

Í Føroyum eru vit **ikki** serstøk, tá ræður um hugburð til PISA og at luttaka í PISA-kanningum. Vit eru heldur **ikki** serstøk, tá tað snýr seg um orsøkir ella hugburð til eina slíka kanning. Hini londini hava júst somu avbjóðingar sum vit. Tí kann tað **ikki** brúkast sum undanførsla, at okkara næmingar eru minni áhugaðir í hesi kanning enn aðrastaðir.

Úrslitini í PISA 2025 vísa eina blandaða mynd.

Á jaligu síðuni kunnu vit staðfesta, at føroyskir næmingar hava hildið støðið í náttúruvísindum og støddfrøði. Í náttúruvísindum eru Føroyar eitt av heilt fáu londunum, sum hava framgongd samanborið við 2022, meðan nógv onnur lond hava afturgongd. Somuleiðis síggja vit eina varliga framgongd í støddfrøði. Hetta eru gleðilig tíðindi. Tað vísir, at nógv gott arbeiði verður gjørt í føroyska skúlanum hvønn einasta dag.

Vit hava til dømis fingið nýtt undirvísingartilfar í rokning seinastu árini, og eisini í lívfrøði, umframt at vit saman við Námsvísindadeildini hava arbeitt við eini verkætlan nevnd "støddfrøði í verki". Eisini, men ikki minst, hava vit sett nýggjar námsætlanir í gildið fyri støddfrøði, føroyskt, lívfrøði og náttúru og tøkni. Tað serstaka við nýggju námsætlanunum er, at vit nú eisini hava didaktiskar og námsfrøðiligar vegleiðingar til námsætlanirnar, sum lærarar kunnu brúka at vegleiða seg við, tá tey undirvísa.

Samstundis mugu vit eisini taka álvarsemi í tí stóru avbjóðing, sum PISA-úrslitini vísa í lesing. Føroyskir næmingar fóru 19 stig aftur í lesing samanborið við 2022. Sostatt eru 42 prosent av okkara næmingum undir markinum fyri virkisført lesiføri. Tað merkir, at ov nógv ung hava trupult við at lesa, skilja, tulka og nýta tekstir á einum stigi, sum nútíðarsamfelagið krevur.

Hetta mugu vit taka í fullum álvara og fáa lesiførleikan rætta vegin.

Lesing er ikki bara eitt fak, sum eru í lærugreinini føroyskt. Lesing er lykilin til læring í øllum lærugreinum. Tað er grundarlagið undir at skilja náttúruvísindi, støddfrøði, samfelagsviðurskifti og okkara fólkaræði. Tá lesiførleikin viknar, ávirkar tað alla læring.

PISA-frágreiðingin vísir á, at føroyskir næmingar ikki skilja seg nógv frá øðrum norðurlendskum næmingum, tá talan er um hugburð og áhuga. Men kanningin vísir eisini, at náttúruvísindaliga og lærufrøðiliga virksemið í føroyskum skúlastovum er minni enn í teimum flestu norðurlondunum. Hetta eigur at fáa okkum at spyrja, hvussu vit skapa meira fjølbroytta og fakliga kveikjandi undirvísing.

Okkara lutfalsliga nýggja náttúruvísindaliga tilfar Gaia byggir á nútíðar førleikar, og ger eisini mun tann rætta vegin. Lat okkum hyggja at tí, ið vit megna. Tað er nógv, ið vit kunnu gera í gerandisdegnum, til dømis meira nýtt og gott undirvísingartilfar og átøk annars til dømis lesi átøk í miðdeild, støddfrøði í verki í hádeild og co-teaching í innskúlingini. Vit kunnu eisini gera nakað við førleikamenning av lærarum á hesum øki, um vit taka kanningina í álvara og fara til verka. Vit hava longu sett eina væleydnaða eftirútbúgvingarskipan í verk á Námsvísindadeildini,sum arbeiðir við førleikunum fyri 21. øld.

PISA gevur okkum ikki eina einfalda loysn.

Frágreiðingin minnir okkum á, at læring verður ávirkað av nógvum ymiskum viðurskiftum. Hesi viðurskifti snúgva seg um undirvísing, undirvísingartilgongdir, undirvísingartilfar, lesivanar, trivnað, skúlamentan og støðuna hjá einstaka næminginum. Tí mugu vit ansa eftir ikki at leita eftir einari einfaldari frágreiðing upp á samansettar avbjóðingar.

Tilmælini, sum verða givin í PISA-frágreiðingini, eru greið.

Vit eiga at styrkja náttúruvísindi í fólkaskúlanum, geva hesum lærugreinum eina greiðari støðu og tryggja fakliga menning hjá lærarum. Vit eiga at halda fram at arbeiða við støddfrøðiligari menning og nýtslu av nýggjum arbeiðs- og læruháttum. Men fram um alt eiga vit at gera lesing til eitt framhaldandi felags átaksøki hjá øllum í skúlaskipanini. Lesing eigur at verða raðfest í øllum lærugreinum við meira nútíðar føroyskum lesitilfari, størri gransking og betri vitan um, hvussu vit fáa tær nýggju avbjóðingarnar, sum talgilda samfelagið hevur við sær. Tøkniligar avbjóðingar eru m.a. vitlíki.

PISA kannar ikki og hevur ikki svar uppá, hví lesingin er viknað síðani 2015. Í frágreiðingini siga tey, at vilja vit vita meira um hetta, mugu vit seta inn við gransking og tí, sum har til hoyrir.

Hetta eiga vit at taka í fullum álvara. Vit skulu ikki gita, men vita. Vit eiga at fylgja væl við í, hvat verður gjørt í hinum Norðurlondunum. Mín vón er, at Námsvísindadeildin fær sett gransking í verk av hesum álvarsmáli.

Í Námi hava vit raðfest lesimenning við einum heilum starvi komandi 3 skúlaárini. Vónandi fer hetta at geva ávøkst úti í skúlunum. Vit hava eisini givið út nýtt tilfar í føroyskum til hádeild, sum samsvarar við nútíðar førleikar. Hetta tilfarið *Dropar* hevur tvær ferðir vunnið europeiska útgevara heiðursløn fyri dygd. Vit hava seinastu árini eisini arbeitt við lesimenning í miðdeild og givið nýtt tilfar til hendan partin. Vit eiga at halda fram og gera enn meira.

PISA 2025 gevur okkum ikki orsøk til at vera ovurfegin. Men, hon gevur okkum heldur ikki orsøk til at geva upp.

Hon gevur okkum eina greiða ábending um, hvar vit eru, hvar vit hava gjørt framstig, og hvar vit hava stórar avbjóðingar. Hetta er júst tað, sum góðar kanningar skulu gera.

Nú er uppgávan okkara. Vit mugu taka hesa vitan og umseta hana til gagns fyri føroysk børn og ung. Saman við politisku skipanini, myndugleikum, lærarum, skúlaleiðarum, foreldrum, skulu vit arbeiða fyri einum uppaftur betri fólkaskúla, har fleiri børn læra meira, trívast enn betur og fáa møguleika at mennast til fulnar.

Eyðun Gaard

Stjóri í Námi